# Clickhaze kann røkka langt

**Ummælarin á Jyllandspostinum heldur, at føroyski bólkurin er hugtakandi. Clickhaze hevur møguleika at røkka langt, um tey arbeiða meira við tónleiki og framførslu, heldur hann.**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Ummælari hjá Jyllandspostinum var til staðar, tá Clickhaze spældi á Midtfyns festivalinum í Ringe í farnu viku, og hann hevur nógv góð orð at bera bólkinum.

- Der er noget ganske uimodståeligt og fascinerende over den færøske sangerinde, Eivør Pálsdóttir, der sammen med den småsære og tillukkede sanger Petur Jensen udgør omdrejningspunktet i det spændende og anderledes færøske band, skrivar Uffe Christensen.

Hann heldur, at Clickhaze spælir øðrvísi tónleik, og at tey eru málrættað í síni leitan eftir nýggjum úttrykki.

– Rigtig meget lykkes for gruppen og med en lidt strammere struktur har Clickhaze så afgjort potentialet til noget stort, heldur ummælarin.

Uffe Christensen heldur, at Clickhaze hevði uppiborið at sloppi at spælt á størri palli bæði í Roskilde og á Midtfyn.

Ummælið kann lesast í heilum líki á heimasíðuni hjá Jyllandspostinum. Adressan er www.jp.dk



*Clickhaze hevði við sínum tónleiki uppiborið at sloppi at spælt á einum av teimum størru pallunum í Roskilde og í Ringe, heldur ummælarin á Jyllandspostinum*

## Clickhaze beinleiðis á DR

**Føroyski rockbólkurin spældi tveir sangir beinleiðis á P3 hjá Danmarks Radio**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Fólkini í Clickhaze er nú liðug við konsertferðina í Danmark. Eftir framførslur í Roskilde, Keypmannahavn, Nibe og Ringe, setti bólkurin mánadagin kósina heimaftur.

Seinasta stóra uppgávan hjá bólkinum var á væl umtóktu útvarpsrásini P3 hjá Danmarks Radio. Clickhaze spældi sangirnar Skirvin Flá og Indigo Brá beinleiðis í eini sending á P3, og framførslan gekk væl. Vertirnir í sendingini tosaðu eisini við Eivør Pálsdóttir og Jón Tyril.

Manningin í Clickhaze hevur hildið frí í nakrar dagar í Danmark, og mánadagin komu tey heim aftur til Føroya. Nú fara tey at arbeiða við nýggjum sangum, og næsta framførslan verður á Gøtustevnu 19. juli.

## Øðrvísi eykaløg á 15 teimum bestu

**Leygarkvøldið sluppu Yggdrasil og Messel fram at í 15 teimum bestu**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Helst vóru tað nýggir vindar, sum fuku um 15 tær bestu hjá Útvarpinum leygarkvøldið.

Av teimum fimm eykaløgunum vóru tvey føroysk. Tað er einki óvanligt í tí, men bólkarnir, sum nú skulu royna seg, hava ikki áður verið á listanum.

Talan er um Yggdrasil við Eivør Pálsdóttir sum sangara og Messel, og næsta leygarkvøld fæst úrslitið av royndini hjá hesum báðum at koma inn á listanum.

Nýggi verturin á 15 teimum bestu, Niels Uni Dam, ætlar at geva fleiri føroyskum løgum møguleikan á listanum, og hetta er longu farið at merkjast.

## Konsert í høllini á Giljanesi

**Fyrsti fyrstu ferð nakrantíð verður rockkonsert í ítróttarhøllini á Giljanesi. Fyrireikararnir vóna, at konsertin verður startskotið til fleiri líknandi tiltøk, tá undirsjóvartunnilin er liðugur**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Næsta vikuskiftið er vestanstevna, og stóra tónleikaliga tiltakið á hesi stevnu er ein konsert, sum verður hildin í ítróttarhøllini á Giljanesi leygarkvøldið.

Høllin hevur nógv ár á baki, men hetta er fyrstu ferð, at konsert verður hildin har. Orsøkin er, at brandkrøvini hava ikki verið uppfylt til at hava konsertir har. Bilastevnur í Vágum hava havt við sær, at nýggjar og breiðari hurðar settar í, so bilarnir kunnu koma inn í høllina. Hetta hevur samstundis við sær, at høllini nú lýkur krøvini, sum setast til konsertir og líknandi tiltøk.

All That Rain er høvuðsnavn á konsertini, og afturat teimum fara Side Effect og limir úr Flux at spæla.

Fyrireikararnir av konsertini vóna, at konsertin verður startskotið til fleiri líknandi tiltøk, tá undirsjóvartunnil um Vestmannasund verður tikin í nýtslu um ársskiftið. Tá ætla tey í Vágum at lokka fólk í oynna til dans og konsertir.

Umframt konsertina leygarkvøldið hevur All That Rain eisinin uppgávuna at spæla til dans í teltinum í Miðvági fríggjakvøldið.



*All That Rain er høvuðsnavn á konsert í Vágum leygarkvøldið*

*Mynd: www.allthatrain.com*



UTTAN ÚR HEIMI

# Óhepni flúgvileiðarin var dani

**17 danir arbeiða hjá sveitsiska flogeftirlitinum Skyguide. Ein terra var flúgvileiðari næstseinasta mánakvøld.**

FLOGSAMANSTOYTURIN
*Árni Joensen:*

Ein danskur flúgvileiðari hjá sveitsiska flogeftirlitinum Skyguide er lagdur inn á sjúkrahús til sálarliga viðgerð. Maðurin hevði ábyrgdina í flogeftirlitinum í Zúrich næstseinasta mánakvøld, tá tvey flogfør stoyttu saman í luftini yvir Suðurtýsklandi. 71 fólk doyðu.

Danin var tann einasti flúgvileiðarin, sum var til arbeiðis í flogeftirlitinum í Kloten-floghavnini hetta kvøldið, tá eitt russiskt ferðamannaflogfar og eitt flutningsflogfar stoyttu saman í 11 kilometra hædd.

Sagt verður, at flogeftirlitið hevði tekniskar trupulleikar hetta kvøldið, og at tað gjørdi, at tann danski flúgvileiðarin gloymdi at halda eygað við teimum báðum flogførunum.

17 danskir flúgvileiðarar arbeiða hjá sveitsiska flogeftirlitinum, sum er ein privat fyritøka. Danin, sum hevði vakt mánakvøldið, hevur arbeitt hjá fyritøkuni í fimm ár.

# Minst 20 druknað í vatnflóð

**Meiri enn 20 fólk eru deyð, og fleiri túsund hava mist hús og heim eftir ódnarveður í stórum pørtum av syðra Asia. Serliga londini við ta Bengalsku Víkina eru meint rakt.**

ÓDNARVEÐUR
*Árni Joensen:*

Ódnarveður við stormi og gloprarregni hevur herjað stór øki har suðuri í Asia teir seinastu dagarnar, og serliga tey tætt bygnu økini í India og Bangladesh eru meint rakt av ódnarveðrinum.

Tær stóru áirnar Ganges, Brahmaputra og Meghna eru farnar upp um bakkarnar nógvastaðni, og tað hevur elvt til stóra vatnflóð. Í indisku landspørtunum Assam og Bihar standa minst 300.000 hús undir í vatni, og bjargingarliðini siga, at vandi er fyri, at uppaftur nógv fleiri hús verða rakt av vatnflóðini.

Í Bangladesh hava túsundtals hermenn og løgreglumenn roynt at hjálpa fólki, og meiri enn 500.000 fólk hava fingið boð um at fara heiman, tí vandi er fyri, at byrgingarnar fram við áunum fara at skrædna.

Tað eru ikki bara India og Pakistan, sum eru rakt av ódnarveðrinum. Í Filipsoyggjunum og í Suðurkorea herjaðu melduródnir um vikuskiftið, og minst 15 fólk skulu hava latið lív í teimum báðum londunum.

Eisini hinumegin Jørðina hevur vatnflóð rikið fólk frá húsum. Í Texas í USA hevur tað regnað so illa, at áirnar eru farnar upp um bakkarnar, og nógv hús standa undir í vatni. Stjórnin hevur lýst partar av statinum sum vanlukkuøki.



*Hesi húsini í Bangla Desh líkjast mest einum flótandi vraki, nú stór øki standa undir í vatni.*

# Kongur í blóðfátækum landi keypir flogfar fyri 300 mió. kr.

**Kongurin í Swazilandi í Afrika hevur bílagt sær eitt privatflogfar fyri meiri enn 300 milliónir krónur.**

AFRIKA
*Árni Joensen*

Swazilendska blaðið Times of Swaziland skrivar, at landsins kongur, Mswati III, hevur bílagt sær sjálvum eitt kanadiskt privatflogfar fyri meiri enn 300 milliónir krónur. Ein partur av pengunum eru longu goldnir.

Tað er landsins ríkiskassi, sum skal gjalda flogfarið, og útreiðslurnar eru tvær ferðir størri enn játtanin til heilsumál á ársins fíggjarlóg. Hetta hevur vakt ans, tí Swaziland er illa herjað av eyðkvæmi og er harafturat eitt av heimsins fátækastu londum. Hjálparfelagsskapir siga, at tveir triðingar av fólkinum, sum telur minni enn eina millión, liva undir fátækramarkinum, og triðja hvørt fólk er HIV-positivt.

Sambært Times of Swaziland hevur kongshúsið boðað frá, at tað er neyðugt at keypa kongi eitt flogfar, so hann kann ferðast sum aðrir ríkisleiðarar, tá hann skal av landinum. Blaðið skrivar eisini, at málið um at keypa flogfarið varð ikki lagt fyri tjóðartingið, sum heldur ikki varð kunnað um keypið.

Swaziland er millum Mozambik og Suðurafrika, og landið er eitt tað seinasta kongsveldi í Afrika.